ÚTVARP

SUNNUDAGUR

Sunnudagin kl. 10.25:

Sunnudagskonsertin


»Stígið í dans á stund«

Veður má sær ráða, er vanligt at taka til, og hetta er eisini forklæringin uppá, at tann ætlaða middagskonsertin seinasta sunnudag ikki varð send, men í staðin kemur nú sunnudagin.

Á skránni er operatónleikur av Rossini — ein ouvertura og ein aria — ein sangur av Johannes Brahms, symfoni nr. 7 av Beethoven, ein aria úr operuni Tosca av Puccini, klavertónleikur av Chopin, Kim Borg syngur ein sang av Sibelius, og at enda hoyra vit romansu fyri violin og orkestur av norska tónaskaldinum Johan Svendsen.

Sunnudagin kl. 12.00:

Guðstænasta úr Skopunar Skopunar kirkju



Í 1895 varð nýggj og størri kirkja bygd í Vestmanna. Samstundis var í umbúna at byggja kirkju í Skopun. Skopuningar keyptu bróstaviðin úr gomlu Vestmanna kirkju, og hesin viðurin var so brúktur til at klæða kirkjuna innan við. Kirkjan er annars laðað úr gróti og pussað uttan.

Altartalvan í Skopunar kirkju myndar Jesus hjá Martu og Mariu. Hetta er kopi, sum Kristin í Geil hevur gjørt eftir málningi hjá Carl Bloch. Ramman um altartalvuna er klassisistisk, og snikkarin Guttormur Eysturoy evnaði hana til.

Kalikurin í Skopunar kirkju er gamal, hevur Keypmannahavnar stempul frá 1728 og meistaramerkið hjá Ole Flores Wilcken frá 1725. Sum kunnugt er Skopun rættiliga nýggj niðursetubygd — teir fyrstu búsettust her í 1833, og kirkja hevur ikki verið í bygdini frammanundan hesari, sum bygd er í 1897.

Útvarpið sendir gudstænastu úr Skopunar kirkju sunnudagin á middegi. Sandoyarprestur, Jákup Reinert Hansen, prædikar.

Sunnudagin kl. 13.40:

»Her blásti ein stormur«

Føroyskir sangir

Skald, tónaskald, sangari og tónleikari — tað eru fáum listamonnum, at allar hesar gávur eru beskornar. Ein av hesum listamonnum er Regin Dahl. Hann hevur yrkt og týtt nógv, hevur sett løg til ein hóp av sangum, og nógvar av teimum hevur hann sjálvur borið fram, hevur sungið sjálvur og hevur eisini fylgispælið.

Sunnudagin fara vit at hoyra Regin syngja seks sangir, sum hann sjálvur hevur gjørt løgini til. Hetta eru yrkingar av Jákupi Hansen, Jóannesi Paturssyni og Hans Andriasi Djurhuus.

Sunnudagin kl. 17.00:

»Vælkomin lítli ferðamaður

12. sending í røðini við donskum tónleiki

HóaSt illveðrið, sum leikað hevur nú í vikuni, er várdagur, og í sendingini við donskum tónleiki verður m.a. trivið í ein sangt úr bókini «Trækfuglene» hjá Steen Steensen Blicher, har hann heilsar tí lítla ferðafuglinum náttargalanum — vælkomin, lítli ferðamaður.

Vit hoyra annars tónleik, sum hevur ein farra av føroyskum dámi yvir sær, «Færøsk ringdans» av Hakon Børresen; symfoniorkestrið hjá danska útvarpinum spælir fantasiina «Dreymamyndir» av H.C. Lumbye, og í 350-árinum fyri føðing dansk-týska barokktónaskaldsins Dietrich Buxtehude hoyra vit eina av kantatum hansara «Alles was ihr tut». Hetta er ein innspæling við kóri og orkestri undir leiðslu av Mogens Wöldike.

Mánadagin kl. 11.01 og kl. 19.00:

Fiskivinnutátturin

Sigmar Bláberg vitjar í Oyndarfirði. Prátað verður við Louis Houman, bónda, sum hevur tann einasta garðin við mjólkikúm.

Hann tosar við Hall Ellingsgaard, form. í Ítróttarfelagnum, sum eisini er eitt bygdarfelag. Teir ætla sær at byggja hús til bygdarvirksemi.

Sólgerð Gaard eigur eina 11 ára gamla dóttir,Sjúrðu, sum er brekað. Og tað er ikki lætt at eiga eitt brekað barn úti á bygd, sigur hon. Einasta umlætting, hon fær, er tá ið dóttirin onkuntíð fer á Ellis- og Røktarheimið í Runavík at vera eitt tiðarskeið. Og hetta er ikki júst tað rætta staðið fyri eitt barn, at vera ímillum bara gomul fólk, har nógv kanska eru í ørviti.

Sigmar tosar við konurnar, sum arbeiða á Fiskavirkinum í Oyndarfirði. Teimum dámar væl at kunna arbeiða har í bygdini, men hvussu er við barnaansingini?



Jákup Andreasen og Jóhann Mortensen leggja til rættis.

Innan fyri tað síðsta árið eru tríggjar kanningar um flakavirkir almannakunngjørdar.

Tríggir fysioterapeutar hava gjørt eina og Jákup Pauli Joensen eina, og nú hevur Allan Kjærsgaard fyri West Norden latið eina kanning gera um arbeiðsumhvørvið og viðurskifti á flakavirkjum.

Kanningin byggir á flakavinnuna í Danmark, Íslandi og Føroyum. Hon staðfestir tað, sum kemur fram í báðum føroysku kanningunum og eisini nógv av tí, sum flakafólk hava vist á í longri tíð.

Jóhann hevur eisini fingið viðmerking frá formanninum í Føroya Ráfiskakeyparafelag og formanninum í Arbeiðarafelag.

MORGUN-lestrarnir

Jóhanna Maria Djurhuus á Argjum lesur

Sálmar og bíbliuorð:

Mánadagur 23. mars
nr. **404** Eitt heim, eitt varandi heim ei her
Matt. 21, 6
nr. **428** Kyrie eleison

Týsdagur 24. mars
nr. **230** Kúra og klaga
Jóhs. 1, 29
nr. **236** Gev mær treyst og trú í treytum

Mikudagur 25. mars (Mariumessudagur)
nr. **91** Góð tann Mariumessan var
Luk. 2, 51
nr. **92** Min sál skal Guði prísa

Hósdagur 26. mars
nr. **251** Guð, eftir tær mær leingist
Jóhs. 15, 9

Fríggjadagur 27. mars
nr. **21** Alveldis drottur
Jóhs. 13, 1
nr. **20** Lovsyng tínum Harra

Leygardagur 28. mars
nr. **271** Ofta tungt er mansins hjarta
Matt. 26, 33
nr. **290** Guð, titt er valdið

Fuji videobond um tú bert vilt hava tað besta!



2 ÁRA ÁBYRGDAR VÁTTAN



Vinarligast send mær vanlig fuji bond:

3 × VHS 180 min.:	295,-
3 × BETA L 750/180 min.:	295,-
3 × VHS 240 min.:	445,-

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr. / býur: _____

LM-handilin

Tlf. 11220 Selumóstoðin



Alt fleiri og fleiri DER-leiga

Størsta, tryggasta og ókeypis TV/VIDEO-tænasta

Hvi keypa tá tú kanst leigað?!

DER VIDEO/SJÓNVARP N. Finsensgøta - Tlf. 1513